


SKIPSKEKS

*Fyri 40-50 árum síðani var ikki serliga nógv bilferðsla. Tað lá tí væl fyri hjá dreingjunum at fara tann langa túrin av Hoyvíksvegnum yvir á staðið har ítróttarhøllin á Hálsi nú stendur. - Vit, dreingirnir gjørdu okkum ordiliga út, og høvdu bæði skipskeks og drykkivørur við okkum, greiðir Torkil Johannesen frá*

# Út at stjala egg

Hinumegin vegin við barnaheim hansara lá trøðin hjá Hanneman Michelsen, sum er pápi Poul Michelsen.

Hanneman var ein maður sum børnini høvdu virðing fyri. Men hann var eisini ein sera dugnaligur pedagogur. Eina søgu um tað, veit Torkil eisini at siga:

Ein dagin hevði hann sníkt seg út fyri dyr við eini grýtu í hondini, tí hann ætlaði sær oman í høsnarhúsið hjá Hanneman eftir eggum, fyri at siga tað milt.

Torkil var smidligur og fekk kropið inn gjøgnum ta smølu lúkuna og inn í høsnarhúsið. Har var væl vorpið, og egg í hópatali lógu í reiðrunum.

Hann gjørdi ikki mætari enn at fylla grýtuna við eggum, og ætlaði sær síðani til hús aftur. Men tað gekk ikki so lætt, tí uttanfyri høsnadyr stóð Hanneman har.

- Her vísti hann av sonnum, hvussu stórur pedagogur hann í roynd og veru var: Ístaðin fyri at skelda meg út, sum helst hevði verið rættast at gera, bað hann meg bara fara innaftur í høsnarhúsið og leggja hvørt einasta egg uppá pláss aftur.

- So var tað liðugt, og meiri bleiv ikki sagt, greiðir Torkil frá.

Hann duldi kortini hendingina í nógv ár fyri mammu síni, Maria. Tá hann so fortaldi henni søguna, tá var tað hon sum bleiv óð!

**›› Ístaðin fyri at skelda meg út, sum helst hevði verið rættast at gera, bað hann meg bara fara innaftur í høsnarhúsið og leggja hvørt einasta egg uppá pláss aftur.**



»THOSE WHERE THE DAYS«

*Ein sjáldsom mynd av økinum við Hoyvíksvegin. Myndin er tikin úr kamarinum hjá Torkil oman móti býnum, har systir hansara, Ninna fer súkklandi framvið*

## Traðir og traðarmenn

Alt økið í nánd av barnaheimi Torkils, var tá merkt av teimum mongu traðunum sum har lógu. Í dag er hinvegin trupult at ímynda sær, tað lív og djóralív sum var har.
- Lat okkum bara taka traðirnar eina fyri og aðra eftir, og staðseta tær í mun til dagsins vinnulív so sum eg minnist tær, sigur Torkil íðin á málinum:

## Miðlon

Har Miðlon í dag liggur, var ein trøð sum Dess átti. Henda trøðin fevndi eisini um økið, har Grón seinast hevði sítt bakarí.

## Mekonomen

Har bygningurin hjá Mekonomen er í dag , hevði Minna á Lava Olsen sína trøð.

## Bileftirlitið

Trøðin hjá pápa Torkil, Jógvan Johannesen lá har, sum Bileftirlitið og bygningurin hjá Føroyaprent er í dag. Hetta var ein leigutrøð uppá umleið 13.000 fermetrar, her tey høvdu seyð og hønur gangandi. Hann fekk byggiloyvi til sethús síni, ímóti tí at hann velti ein part av trøðni.
- Pápi var raskur arbeiðsmaður, var óførur at velta og bygdi húsini sjálvur, og legði sjálvur vatnið inn. Tað var ikki bara sum at siga tað, tí her var eingin vatnleiðing at knýta í.
- Vit fingu ikki wc fyrrenn eg var rættiliga gamal. Hjá okkum var ikki annað at gera enn at brúka eina bukku, sigur Torkil við einum brosi.
Eisini kann nevndast tvær áhugaverdar rundar betonbarakkir, har onnur stóð yvirav Hoyvíkstjørn og hin, sum var ein dupultbetonbarakk, stóð áleið har sum innkoyringin til Føroyaprent er. Hendan barakkin bleiv mest brúkt til goymslu av ymiskum fiskireiðskapi m.a. smíðaðu koyggjusengurnar, sum vóru umborð á Karin K, tá hon sigldi til Grønlands við útróðrarmonnum. Men hetta varð eisini brúkt til spælipláss hjá børnunum.

## Leif Mohr/Guttesen& Staksberg

Har fyritøkan hjá Leif Mohr er í dag, átti Niels Hansen sína trøð, og longu niðri, har Guttesen & Staksberg var, og har Rúsan áður helt til, átti Kári við Stein, sum hevur búð í Grønlandi í umleið 40 ár, sína trøð. Jafet Danberg hevði sín seyð gangandi á hesari trøðni.

## Pitstop/Mentamálaráðið

Hinumegin Hoyvíksvegin, har Pistop í dag heldur til var eitt stoypivirki, og við síðuna av henni ein trøð sum Debes brøðurnir eiga. Har Mentamálaráðið er í dag lá trøðin hjá Lilleven.

## PM/Posta

PM Heilsølan hevur í dag spent seg rættiliga út. Men frammanundan hevði Hanneman Michelsen sína trøð har. Hann var pápi núverandi forstjóran, Poul Michelsen. Og har Posta og Bónus halda til í dag, hevði Olaf á Lava sína trøð og sín seyð gangandi. Harry Eysturlíð hevði sína trøð millum hesar báðar.